HAGSTOVA FØROYA

Ferðavinnuhagtøl eftir altjóða leisti

Tourism Satellite Account

Beinta Haraldsen, verkætlanarleiðari

Kári Holm Johannesen, deildarleiðari

Útgáva 1.0

31. januar 2022

INNIHALD

1 Inngangur 3
1.1 Bygnaður á uppritinum 3

2 Hagtalsframleiðsluleisturin - GSBPM 5

3 Tourism Satellite Account 7

4 Allýsingar og hugtøk 8
4.1 Ferðing 8
4.2 Ferðandi 8
4.3 Vitjandi 8
4.4 Vanliga umhvørvið 8
4.5 Ferðavinna 9
4.6 Ferðavinnuvørur 9
4.7 Høvuðsendamál við ferð 9
4.8 Vinnugrein innan ferðavinnu 10
4.9 Sløg av ferðavinnu 10

5 Mát 11
5.1 Yvirlit yvir tær 10 talvurnar 11
5.2 Talva 1 – Nýtsla í inngangandi ferðavinnu 12
5.3 Talva 2 – Nýtsla í innlendis ferðavinnu 14
5.4 Talva 3 – Nýtsla í útgangandi ferðavinnu 16
5.5 Talva 4 – Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu 18
5.6 Talva 5 – Framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum 20
5.7 Talva 6 – Ferðavinnan í búskapinum 23
5.8 Talva 7 – Starvssetanir í ferðavinnuni 27
5.9 Talva 8 – Samlaða virðið av íløgum í ferðavinnuni 30
5.10 Talva 9 – Almenna felagsnýtslan innan ferðavinnu 33
5.11 Talva 10 – Ikki-peningaligir ávísar 35
5.12 Talva 10a – Tal av ferðum og gistingum 36
5.13 Talva 10b – Inngangandi ferðavinna: Komur og gistingar 38
5.14 Talva 10c – Tal av gistingarstøðum og kapasitetur 40
5.15 Talva 10d – Tal av arbeiðsstøðum í vinnugreinum innan ferðavinnu 42

6 Dømi um úrslit 44
6.1 Dømi 1: Inngangandi nýtsla og innlendis nýtsla 44
6.2 Dømi 2: Dagsnýtsla eftir vøru og bústaðarlandi 45
6.3 Dømi 3: Dagsnýtsla hjá inngangandi ferðafólkum eftir høvuðsendamáli 46
6.4 Dømi 4: Høvuðsendamál við ferð 47
6.5 Dømi 5: Nýtsla per íbúgva 48

7 Keldur 49
7.1 Núverandi keldur 49
7.2 Ótroyttar keldur 50
7.3 Nýggjar høvuðskeldur 51

8 Menningarætlan 53
8.1 Menningarætlan fyri talvur 53
8.2 Menningarætlan fyri keldur og skipanir 54

9 Perspektivering: Økisbýtt ferðavinnuhagtøl 57

10 Keldulisti 58

1 INNGANGUR

Visit Faroe Islands hevur biðið Hagstovu Føroya um eina forkanning av at menna ferðavinnuhagtalsøkið í Føroyum. Stórur tørvur er á at kunna lýsa týdningin av ferðavinnuni í føroyska búskapinum og at hava væl undirbygd ferðavinnuhagtøl, sum kunnu brúkast sum stýringsamboð fyri ferðavinnuna. Tørvur er eisini á at kunna samanbera føroyska ferðavinnu við ferðavinnu í øðrum londum.

Lond, sum raðfesta ferðavinnu høgt, hava væl undirbygd ferðavinnuhagtøl. Ferðavinnuhagtøl hava nevniliga stóran týdning fyri at skapa eitt nøktandi avgerðargrundarlag fyri menning og raðfesting í ferðavinnuni, soleiðis at ferðavinnan ikki arbeiðir í blindum. Nógvir áhugapartar í ferðavinnuni hava tí tørv á útgreinaðum ferðavinnuhagtølum. Talan er m.a. um politisku skipanina, Visit Faroe Islands, kommunur, kunningarstovur og mongu ferðavinnuveitararnar.

Mælt verður til at menna ferðavinnuhagtalsøkið eftir altjóða leisti.

FERÐAVINNUHAGTØL EFTIR ALTJÓÐA LEISTI

Hagstovur kring knøttin skipa sítt virksemi eftir altjóða leisti frá hagtalsstovninum hjá Sameindu Tjóðum og byggja síni hagtøl á altjóða handbøkur frá ST og øðrum altjóða stovnum fyri at tryggja altjóða sambærlig hagtøl. Handbøkurnar skulu tryggja, at hagstovurnar brúka sama mál við felags hugtøkum og uppgerðarhættum. Tá ið farið verður undir at menna eitt nýtt hagtalsøki, verður støði tí tikið í viðkomandi altjóða handbókum.

Hagstovur, sum menna ferðavinnuhagtøl, arbeiða eftir einum uppgerðarhátti, sum verður nevndur Tourism Satellite Account, stytt *TSA*. 25 lond í ES og yvir 60 lond tilsamans í heiminum arbeiða við Tourism Satellite Account. Høvuðsendamálið við Tourism Satellite Account er at tryggja, at øll lond í heiminum fylgja somu meginreglum, tá ið tey uppgera búskaparlig ferðavinnuhagtøl og tá ið tey meta um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni.

Tvey av londunum í Evropa, sum framleiða ferðavinnuhagtøl eftir hesum leisti, eru Ísland og Danmark. Í sambandi við hesa forkanningina hevur Hagstova Føroya leitað sær vitan í Íslandi og Danmark. Umboð frá Hagstovu Føroya hava í hesum sambandi vitjað íslendsku og donsku hagstovurnar Hagstofa Íslands og Danmarks Statistik. Harumframt hava umboðini vitjað Visit Denmark og granskingarstovnin Center for regional- og turismeforskning. Hesir stovnar hava ment TSA frá grundini í Íslandi og Danmark. Í Danmark hava tey ment ferðavinnuhagtøl í fleiri áratíggju og hava ment og framleitt TSA síðan 2003. Tey hava tí drúgvar royndir á hesum øki. Í Íslandi fóru tey undir at menna TSA í 2008. Týdningurin av ferðavinnuni í Íslandi vaks munandi eftir fíggjarkreppuna og tí hevur menningin av ferðavinnuhagtølum eisini fingið høga raðfesting.

Hagstova Føroya hevur fingið innlit í royndir og avbjóðingar við at menna TSA í Íslandi og Danmark og kunning um teirra núverandi arbeiði og framtíðarætlanir við TSA. Innlitið skal serliga stuðla undir, at menningartilgongdin av TSA í Føroyum ikki verður darvað av somu byrjanartrupulleikum sum í Danmark og Íslandi. Samstundis hevur hetta givið fyridømi um, hvussu TSA kann mennast og framleiðast í Føroyum.

1.1 BYGNAÐUR Á UPPRITINUM

Uppritið er skipað í fleiri pørtum. Í fyrsta parti verður leisturin útgreinaður, sum forkanningin byggir á og lýst verður, hvat uppritið er avmarkað til. Annar partur snýr seg um upprunan av og endamálið

við Tourism Satellite Account, sum ferðavinnuhagtølini byggja á. Síðan verða viðkomandi allýsingar og hugtøk lýst. Fimti partur er um tær 10 talvurnar, sum eru karmarnir um úrslitini av TSA. Eftir hetta verður víst á nøkur ítøkilig dømi, sum kunnu koma burturúr talvunum. Síðan verða núverandi, ótroyttar og nýggjar keldur lýstar, sum skulu brúkast til arbeiðið við TSA. Eftir hetta verður ein menningarætlan fyri næstu trý árini lýst við støði í menning av viðkomandi keldum og skipanum. Til seinast verður víst á møguleikar at útbyggja TSA við økisbýttum ferðavinnuhagtølum.

2 HAGTALSFRAMLEIÐSLULEISTURIN - GSBPM

Forkanningin er skipað eftir altjóða standardiseraðum leisti fyri hagtalsframleiðslu, *Generic Statistical Business Process Model* (stytt *GSBPM*), sum hagstovur brúka, tá tær greina og meta um allar neyðugu tættir í nýggjari hagtalstilgongd.

Leisturin hevur greiðar mannagongdir fyri tørvslýsing, sniðgeving av ynskta hagtalsúrslitinum, samanseting av innheintingaramboðum, innsavnan av upplýsingum, viðgerð av hagtølum, greining, miðlan og eftirmeting av hagtalsframleiðsluni.

Yvirskipaði leisturin fyri hagtalsframleiðslu kann býtast upp í tveir serstakar partar, sum verða lýstir á myndini á næstu síðu. Fyrri parturin snýr seg um at byggja hagtalsskipanina (stig 1-3), ímeðan seinni parturin snýr seg um at framleiða hagtøl (stig 4-8).

Uppritið avmarkar seg til stig 1 í GSBPM, sum snýr seg um at lýsa tørvin í sambandi við menning av einari føroyskari Tourism Satellite Account. At lýsa tørvin snýr seg um at eyðmerkja tørv, eftirkanna og staðfesta tørvin, áseta ynskta úrslitið, eyðmerkja neyðugu hugtøkini í hagtalsframleiðsluni, kanna hvørji hagtøl eru tøk til hagtalsframleiðslu og til seinast at fyrireika eina kostnaðarmeting.

Hagtalsframleiðslu-myndilin

Generic Statistical Business Process Model

1 Lýsa tørvin
Specify Needs

1.1 Greina tørvin
Identify needs

1.2 Eftirkanna og staðfest tørvin
Consult and confirm needs

1.3 Áseta endamálið við høvuðsmátunum
Establish output objectives

1.4 Eyðmerkja hugtøkini
Identify concepts

1.5 Kanna tøkar dátur
Check data availability

1.6 Seta upp avgerðargrundarlag
Prepare and submit business case

2 Sniðgeva skipan
Design

2.1 Áseta mátini
Design outputs

2.2 Lýsa variablarnar
Design variable descriptions

2.3 Sniðgeva innsavningar-háttalagið
Design collection

2.4 Áseta úrvalsfjøld og stakroyndir
Design frame and sample

2.5 Sniðgeva hagfrøðiliga háttalagið
Design processing and analysis

2.6 Sniðgeva framleiðsluskipanina og arbeiðsgongdirnar
Design production systems and workflow

3 Byggja skipan
Build

3.1 Byggja ella endurnýta innheintingaramboðini
Reuse or build collection instruments

3.2 Byggja ella endurnýta greiningarkomponentar
Reuse or build analysis components

3.3 Byggja ella endurnýta útgávukomponentar
Reuse or build dissemination components

3.4 Skipa arbeiðsgongdirnar
Configure workflows

3.5 Royndarkoyra framleiðsluskipanirnar
Test production systems

3.6 Royndarkoyra hagtalsskipanina
Test statistical business process

3.7 Samanseta endaligu framleiðsluskipanina
Finalise production systems

4 Heinta inn dátur *Collect*

4.1 Áseta úrvalsfjøld og gera stakroyndarúrval
Create frame and select sample

4.2 Skipa innheintan
Set up collection

4.3 Fremja innheintanina
Run collection

4.4 Leggja dátutilfarið í viðgerðarskipanina
Finalise collection

5 Viðgera tilfarið
Process

5.1 Seta dátur saman frá ymsu keldunum
Integrate data

5.2 Flokka og kota
Classify and code

5.3 Eftirkanna og góðskutryggja tilfarið
Review and validate

5.4 Editera og imputera
Edit and impute

5.5 Gera avleiddar variablar og eindir
Derive new variables and units

5.6 Rokna vektir
Calculate weights

5.7 Rokna totalar
Calculate aggregates

5.8 Gera endaligar *(makro)* dátutalvur
Finalise data files

6 Greina tilfarið
Analyse

6.1 Fyrireika og víðka hagtølini
Prepare draft outputs

6.2 Eftirkanna hagtølini
Validate outputs

6.3 Tulka og greina hagtølini
Interpret and explain outputs

6.4 Diskretionera
Apply disclosure control

6.5 Gera endaliga útgávutilfarið
Finalise outputs

7 Miðla hagtølini
Disseminate

7.1 Dagføra útgávuskipanina
Update output systems

7.2 Framleiða útgávutilfarið
Produce dissemination products

7.3 Skipa leysgeving av útgávuni
Manage release of dissemination products

7.4 Miðla útgávuna
Promote dissemination products

7.5 Skipa brúkara-hjálp
Manage user support

8 Eftirmeta
Evaluate

8.1 Savna íkast til eftirmetingina
Gather evaluation inputs

8.2 Eftirmeta
Conduct evaluation

8.3 Gera ætlan fyri betringum
Agree an action plan

3 TOURISM SATELLITE ACCOUNT

Tourism Satellite Account er ein serligur fylgiroknskapur fyri ferðavinnu, sum er knýttur at tjóðarroknskapinum. Endamálið við Tourism Satellite Account er at tryggja, at øll lond í heiminum fylgja somu meginreglum, tá ið tey uppgera búskaparlig ferðavinnuhagtøl og tá ið tey meta um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni.

Ferðavinna finst ikki sum vinnugrein í tjóðarroknskapinum á sama hátt sum t.d. fiskivinna og byggivinna. Búskaparliga ávirkanin av ferðavinnu kann tí ikki lýsast við at kanna eina ávísa vinnugrein ella ein ávísan bólk av vørum og tænastum, tí ferðavinna virkar tvørtur um nógvar vinnugreinar, sum t.d. gistingartænastur, tænastuveiting av mat- og drykkjuvørum og ferðaflutning loftvegis og sjóvegis. Tað hevur tí í fleiri áratíggju verið ein avbjóðing at menna ein altjóða leist fyri at gera eina neyva meting av búskaparliga ískoytinum frá ferðavinnuni. Ein avbjóðing hevur harumframt verið at kunna samanbera ferðavinnuhagtøl tvørtur um lond. Tað hevur tí verið tørvur á einsháttaðum uppgerðarhættum, sum eru altjóða ásettir.

Menningin av Tourism Satellite Account byrjaði í 1980'unum. Fleiri altjóða felagsskapir, so sum hagtalsstovnurin hjá ST, altjóða ferðavinnustovnurin hjá ST (World Tourism Organization), OECD og Eurostat hava verið partur av arbeiðnum at gera leiðreglur fyri Tourism Satellite Account. Hesir altjóða felagsskapirnir viðmæla Tourism Satellite Account sum háttalag, tá ið metast skal um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni. Seinasta endurskoðaða útgávan av Tourism Satellite Account er frá 2008 og fevnir um tvær høvuðshandbøkur: *Tourism Satellite Account: Recommended Methodological Framework 2008* og *International Recommendations for Tourism Statistics 2008.*

Tað eru 25 lond í ES og yvir 60 lond tilsamans í heiminum, sum arbeiða við Tourism Satellite Account. Í flestu londunum eru tað hagstovurnar, sum standa fyri menningini og framleiðsluni av Tourism Satellite Account.

Sæð frá einum búskaparligum sjónarmiði gevur ein fullfíggjað Tourism Satellite Account:

- Makrobúskaparlig høvuðstøl, ið lýsa stødd og beinleiðis búskaparískoytið frá ferðavinnu - t.d. bruttovirðisøking, ið stavar frá ferðavinnu og sum er sambærligt við líknandi høvuðstøl fyri búskapin í sínari heild og aðrar partar av vinnuligum virksemi
- Útgreinað hagtøl fyri nýtslu av vørum í ferðavinnu, har vitjandi verða eyðmerkt sum brúkarar, og sum vísa, hvussu hesin eftispurningur verður nøktaður við innlendis framleiðslu og innflutningi. Hesi hagtøl eru partur av uppgerð av til- og frágongd í tjóðarroknskapinum í ársins og føstum prísum
- Útgreinað hagtøl av framleiðslukontu fyri vinnugreinar innan ferðavinnu, tal og slag av størvum v.m., samanberingar við annað vinnuligt virksemi og fastar bruttoíløgur í ferðavinnu

Harumframt gevur ein fullfíggjað TSA onnur ikki-búskaparlig hagtøl innan ferðavinnu, so sum tal av ferðum, longd á ferð, høvuðsendamál við ferð, ferðahættir v.m., ið geva møguleika fyri at greina innihaldið í búskaparligu tølunum neyvari.

4 ALLÝSINGAR OG HUGTØK

Í hesum parti verða allýsingar og hugtøk lýst, sum eru viðkomandi fyri arbeiðið við TSA. Hugtøkini eru við til at áseta og avmarka, hvat ferðavinna fevnir um í hagtalshøpi.

Allýsingar og hugtøk innan ferðavinnuhagtøl verða lýst í handbókini *International Recommendations for Tourism Statistics 2008.* Karmarnir um Tourism Satellite Account verða lýstir í handbókini *Tourism Satellite Account: Recommended Methodological Framework 2008*, sum OECD, Eurostat, ST og UNWTO góvu út í 2008. Niðanfyri eru nøkur av lyklahugtøkunum og -allýsingunum, sum eru viðkomandi fyri arbeiðið við TSA.

4.1 FERÐING

Ferðing (á enskum *travel*) fevnir um virksemið hjá ferðandi (á enskum *traveller*).

4.2 FERÐANDI

Ein ferðandi (á enskum *traveller*) er ein, sum flytir seg millum ymisk landafrøðilig øki, innanlands og uttanlands, við einhvørjum endamáli í styttri og longri tíðarskeið.

4.3 VITJANDI

Ein vitjandi (á enskum *visitor)* er ein ferðandi, sum ferðast til eitt høvuðsferðamál, sum er uttan fyri hansara/hennara vanliga umhvørvi. Ferðin skal vera í minni enn eitt ár og høvuðsendamálið við ferðini skal vera vinna, frítíð ella onnur persónlig endamál. Hetta fevnir tó ikki um arbeiðstøku hjá einum lokalum arbeiðsgevara.

Øll ferðandi verða tí ikki roknað sum vitjandi og tískil eru vitjandi ein deilmongd av ferðandi.

Í hesum uppriti er tó valt at brúka heitið ferðafólk um vitjandi, hóast skilnaður verður gjørdur millum eindagsvitjandi og ferðafólk í Tourism Satellite Account. Tað merkir, at í hesum uppriti verður heitið ferðafólk nýtt um bæði ferðafólk og eindagsvitjandi. Heitini eindagsvitjandi og ferðafólk verða tó nýtt í talvunum í 6. parti, tí tær eru beinleiðis týddar úr enskum.

Heitini ferðafólk og eindagsvitjandi sambært TSA verða lýst niðanfyri.

FERÐAFÓLK

Ein vitjandi verður flokkaður sum eitt ferðafólk, um ferðin fevnir um eina ella fleiri gistingar.

EINDAGSVITJANDI

Ein vitjandi, sum ikki gistir á ferðamálinum, verður nevndur ein eindagsvitjandi (á enskum *same-day visitor* og *excursionist*).

4.4 VANLIGA UMHVØRVIÐ

Vanliga umhvørvið (á enskum *usual environment)* hjá einum einstaklingi er eitt lyklahugtak innan ferðavinnuhagtøl. Vanliga umhvørvið verður allýst sum landafrøðiliga økið, har ein einstaklingur hevur sínar gerandisrutinur. Eitt av endamálunum við at nýta hugtakið *vanliga umhvørvið* er at útiloka tey vitjandi, sum ferðast javnan ímillum sín bústað og har, sum tey arbeiða, lesa og annars vitja sum partur av gerandisrutinunum.

4.5 FERÐAVINNA

Ferðavinna (á enskum *tourism)* er meira avmarkað enn ferðing, tí ferðavinna fevnir um ávísa slagið av ferðum, har ein ferðandi ferðast úr sínum vanliga umhvørvi í minni enn eitt ár og høvuðsendamálið við ferðini er vinna, frítíð ella onnur persónlig endamál. Hetta fevnir tó ikki um arbeiðstøku hjá einum lokalum arbeiðsgevara.

Øll ferðing er tí ikki ferðavinna og ferðavinna er tí ein deilmongd av ferðing.

4.6 FERÐAVINNUVØRUR

Ferðavinnuvørur (á enskum *tourism products*) kunnu flokkast í sermerktar ferðavinnuvørur (á enskum *tourism characteristic products*) og aðrar vørur, sum eru tengdar at ferðavinnu *(á enskum tourism connected products)*.

SERMERKTAR FERÐAVINNUVØRUR

Sermerktar ferðavinnuvørur (á enskum *tourism products)* verða allýstar sum vørur, sum fyrst og fremst verða keyptar av ferðafólkum. Áseting av, hvørjar vørur eru sermerktar ferðavinnuvørur, mugu vera samsvarandi ásetingunum í tjóðarroknskapinum. Sermerktar ferðavinnuvørur fevna um tær vørur, sum vanliga verður hugsað um í sambandi við ferðavinnuvirksemi, so sum vørur, sum verða seldar í sambandi við gisting, matstovuvirksemi, ferðaskrivstovuvirksemi v.m.

Sermerktu ferðavinnnuvørurnar verða deildar upp í altjóða ásettar sermerktar ferðavinnuvørur umframt tær ferðavinnuvørurnar, sum hvørt land ásetir at vera serstakar fyri júst tað landið. Eitt dømi um sermerkta ferðavinnuvøru, sum er serstøk fyri ferðavinnuna í eitt nú Noregi, er skíðrenning. Tað er tí ein sermerkt ferðavinnuvøra, sum Noreg hevur ásett at vera serstaka fyri landið.

AÐRAR VØRUR, SUM ERU TENGDAR AT FERÐAVINNU

Aðrar vørur, sum eru tengdar at ferðavinnu (á enskum *tourism connected products)*, eru vørur, sum ferðafólk keypa, men ikki verða roknaðar sum sermerktar ferðavinnuvørur. Hetta kann t.d. vera, tá ið ferðafólk keypa bensin ella matvørur í einum matvøruhandli.

4.7 HØVUÐSENDAMÁL VIÐ FERÐ

Høvuðsendamál við ferð (á enskum *main purpose of trip)* er høvuðsorsøkin til ferðina.

Høvuðsendamálið við ferðini er við til at avgera, um ferðin verður roknað sum ein ferðavinnuferð (á enskum *tourism trip*) og um tann ferðandi verður roknaður sum ein vitjandi. Ein vitjandi kann væl vinna sær eitt sindur av peningi í sambandi við ferðina, men um hetta er høvuðsendamálið við ferðini, verður hann ikki roknaður sum ein vitjandi, men sum *annar ferðandi* (sí frágreiðing niðanfyri).

Ferðandi verða flokkað soleiðis eftir høvuðsendamáli við ferð:

VITJANDI

1. Persónlig endamál
    - Frítíð
    - Vitja familju og vinir
    - Útbúgvingarørindi
    - Heilsuørindi

- Pílagrímsferð, missionering o.l.
- Innkeypsferð (á enskum *shopping*)
- Gjøgnumferð (á enskum *transit)*
- Annað

2. Handils- og vinnuørindi

ONNUR FERÐANDI, SUM IKKI VERÐA ROKNAÐ SUM VITJANDI

- Langtíðarlesandi og sjúklingar uttanlands
- Manningar umborð á flogførum og skipum
- Árstíðarbundnir arbeiðarar
- Aðrir stutttíðararbeiðarar
- Langtíðararbeiðarar
- Tey, sum arbeiða við landamørkini
- Tey, sum ferðast javnan um landamørkini
- Onnur - diplomatar, hermenn v.m.

4.8 VINNUGREIN INNAN FERÐAVINNU

Ein vinnugrein innan ferðavinnu (á enskum *tourism industry)* umboðar bólkin av teimum, sum hava sítt høvuðsvirksemi innan veiting av vørum og tænastum til ferðafólk.

4.9 SLØG AV FERÐAVINNU

Í Tourism Satellite Account er ferðavinna býtt upp í trý høvuðssløg av ferðavinnu.

INNGANGANDI FERÐAVINNA

Inngangandi ferðavinna (á enskum *inbound tourism*) fevnir um virksemið hjá ferðafólkum úr øðrum londum, sum ferðast til Føroya. Hetta snýr seg ikki um tjóðskap, men bústaðarland. Tvs., at føroyskir útisetar, sum fara á eina frítíðarferð til Føroya, eru inngangandi ferðafólk.

INNLENDIS FERÐAVINNA

Innlendis ferðavinna (á enskum *domestic tourism)* fevnir um virksemið hjá ferðafólkum, sum búgva í Føroyum og ferðast í egnum landi.

ÚTGANGANDI FERÐAVINNA

Útgangandi ferðavinna (á enskum *outbound tourism)* fevnir um virksemið hjá ferðafólkum, sum búgva í Føroyum og fara uttanlands at ferðast.

5 MÁT

Í Tourism Satellite Account verður ferðavinnan máld við 10 ymiskum talvum, sum lýsa ymiskar partar av ferðavinnuni. Talvurnar byggja á allýsingarnar og hugtøkini í undanfarna parti.

Tvey afturvendandi evni í teimum 10 talvunum eru nýtsla og framleiðsla. Nýtslan lýsir, hvussu nógvan pening ferðafólk brúka og hvørjar vørur og tænastur, ferðafólkini keypa. Framleiðslan lýsir virðið á vørum og tænastum, sum verða framleidd í ferðavinnuni.

Niðanfyri er eitt stutt yvirlit yvir tær 10 talvurnar, sum eru karmurin um Tourism Satellite Account.

5.1 YVIRLIT YVIR TÆR 10 TALVURNAR

Tær tíggju talvurnar eru:

1. Nýtsla í inngangandi ferðavinnu
2. Nýtsla í innlendis ferðavinnu
3. Nýtsla í útgangandi ferðavinnu
4. Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu
5. Framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum
6. Ferðavinnan í búskapinum
7. Starvssetanir í ferðavinnuni
8. Samlaða virðið av íløgum í ferðavinnuni
9. Almenna felagsnýtslan innan ferðavinnu
10. Ikki-peningaligir ávísar

STUTT LÝSING AV TALVUNUM

Nýtslan hjá ferðafólkum í ávikavist inngangandi, innlendis og útgangandi ferðavinnu verður gjørd upp í talvunum 1-3.

Talva 4 er ein samanlegging av talvu 1 og 2, t.v.s. inngangandi og innlendis nýtsla tilsamans.

Talva 5 vísir framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum, sum verða framleiddar til ferðavinnuna.

Talva 6 er høvuðstalvan í Tourism Satellite Account og lýsir ferðavinnuna í búskapinum.

Talva 7 lýsir starvssetanir innan ferðavinnuna, ímeðan talva 8 og 9 vísa samlaða virðið av íløgum í ferðavinnu og almennu felagsnýtsluna í ferðavinnuni.

Talva 10 vísir ikki-peningaligar ávísar innan ferðavinnu.

Í komandi pørtum verða einstøku talvurnar lýstar nærri. Talvurnar, sum verða vístar, eru týddar til føroyskt úr enskum og eru uppsettar á neyvt sama hátt sum í handbókini *Tourism Satellite Account: Recommended Methodological Framework 2008.*

5.2 TALVA 1 – NÝTSLA Í INNGANGANDI FERÐAVINNU

Talva 1 lýsir nýtslu í inngangandi ferðavinnu. Tað vil siga, hvussu nógvan pening ferðafólk úr øðrum londum brúka upp á vørur og tænastur í Føroyum. Við hesum ber t.d. til at lýsa, hvussu nógvan pening ferðafólk brúka upp á eitt nú gisting og ferðing.

Tað ber til at greina nýtsluna nærri enn tað, sum verður lýst í sjálvari talvuni. T.d. kann nýtslan í inngangandi ferðavinnu býtast á bústaðarland hjá ferðafólkunum. Tað merkir, at hagtølini eitt nú kunnu vísa, hvussu nógvan pening fronsk ferðafólk brúka upp á ferðavinnuvørur í Føroyum. Tað ber eisini til at greina nýtsluna í inngangandi ferðavinnu eftir høvuðsendamáli við ferð og á tann hátt lýsa, hvussu nógvan pening vinnuferðafólk brúka í mun til frítíðarferðafólk.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa tær ymisku vørurnar í ferðavinnuni.

Í teigunum úteftir á talvuni verða inngangandi vitjandi býtt upp í tríggjar bólkar:

- Ferðafólk (vitjandi, sum gista)
- Eindagsvitjandi
- Vitjandi tilsamans (ferðafólk + eindagsvitjandi)

Talva 1 - Nýtsla í inngangandi ferðavinnu

býtt á vørur og sløg av vitjandi

Vørur	Nýtsla í inngangandi ferðavinnu		
	Ferðafólk (vitjandi, sum gista) (1.1)	Eindagsvitjandi (1.2)	Vitjandi tilsamans (1.3) = (1.1) + (1.2)
Tilsamans			
A. Nýtsluvørur			
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur			
1. Gistingartænastur til vitjandi		X	
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b		X	
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum		X	
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur			
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt			
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi			
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning			
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning			
7. Tænastur innan útleigan av akførum			
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur			
9. Mentanarligar tænastur			
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð			
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið			
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið			
A.2. Aðrar nýtsluvørur			
B.1. Virðislutir			

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

5.3 TALVA 2 – NÝTSLA Í INNLENDIS FERÐAVINNU

Talva 2 lýsir nýtslu í innlendis ferðavinnu. Tað vil siga, hvussu nógvan pening ferðafólk, sum búgva í Føroyum og ferðast í egnum landi, brúka upp á vørur og tænastur. Nýtslan fevnir eisini um keyp í Føroyum, sum verða gjørd í sambandi við eina útgangandi ferð. Tað merkir, at innlendis ferðavinna eisini fevnir um keyp av ymiskum vørum og tænastum í Føroyum í sambandi við ferð av landinum, so sum keyp av bussferð á flogvøllin og mat á flogvøllinum í sambandi við ferðina.

Tað ber til at greina innlendis nýtsluna nærri enn tað, sum verður lýst í sjálvari talvuni. T.d. kann nýtslan í innlendis ferðavinnu býtast á bústaðarøki og nýtsluøki hjá innlendis ferðafólkum. Soleiðis ber t.d. til at lýsa, hvussu nógvan pening ferðafólk úr Suðuroy brúka í sambandi við ferðir í Havn og hvussu stóran part, tey brúka á matstovum og gistingarhúsum.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa tær ymisku vørurnar.

Í teigunum úteftir á talvuni verður nýtslan í innlendis ferðavinnu býtt upp í:

- Nýtslu í sambandi við innlendis ferðir
- Nýtslu í Føroyum í sambandi við útgangandi ferðir
- Øll sløg av ferðum (nýtsla í sambandi við innlendis ferðir + nýtsla í sambandi við útgangandi ferðir)

Vitjandi verða harumframt býtt upp í tríggjar bólkar:

- Ferðafólk (vitjandi, sum gista)
- Eindagsvitjandi
- Vitjandi tilsamans (ferðafólk + eindagsvitjandi)

UM INNLENDIS FERÐAVINNU

Í løtuni eru ongin hagtøl um innlendis ferðavinnu, tí verandi hagtøl einans lýsa inngangandi ferðavinnu. Um hugt verður eftir býtinum millum inngangandi ferðavinnu og innlendis ferðavinnu í Danmark, sær tað soleiðis út fyri 2019: 43% av nýtsluni eru frá inngangandi ferðavinnu, ímeðan 57% av nýtsluni stava frá innlendis ferðavinnu. Verður hugt eftir býtinum í londum í Evropa, fyllir innlendis ferðavinna í miðal 65%, ímeðan inngangandi ferðavinna í miðal fyllir 35%.

Talva 2 - Nýtsla í innlendis ferðavinnu

býtt á vørur, sløg av vitjandi og sløg av ferðum

Vørur	Nýtsla í innlendis ferðavinnu								
	Innlendis ferðir			Útgangandi ferðir			Øll sløg av ferðum		
	Ferðafólk (vitjandi, sum gista)	Eindagsvitjandi (2.2)	Vitjandi tilsamans (2.3) = (2.1) + (2.2)	Ferðafólk (vitjandi, sum gista) (2.4)	Eindagsvitjandi (2.5)	Vitjandi tilsamans (2.6) = (2.4) + (2.5)	Ferðafólk (vitjandi, sum gista) (2.7) = (2.1) + (2.4)	Eindagsvitjandi (2.8) = (2.2) + (2.5)	Vitjandi tilsamans (2.9) = (2.3) + (2.6)
Tilsamans									
A. Nýtsluvørur									
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur									
1. Gistingartænastur til vitjandi		X			X			X	
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b		X			X			X	
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum		X			X			X	
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur									
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt									
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi									
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning									
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning									
7. Tænastur innan útleigan av akførum									
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur									
9. Mentanarligar tænastur									
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð									
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið									
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið									
A.2. Aðrar nýtsluvørur									
B.1. Virðislutir									

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

5.4 TALVA 3 – NÝTSLA Í ÚTGANGANDI FERÐAVINNU

Talva 3 lýsir nýtslu í útgangandi ferðavinnu. Tað vil siga, hvussu nógvan pening ferðafólk úr Føroyum brúka upp á vørur og tænastur í sambandi við ferðavinnuferðir uttanlands.

Tað ber til at greina nýtsluna í útgangandi ferðavinnu nærri enn tað, sum verður lýst í sjálvari talvuni. T.d. kann nýtslan í útgangandi ferðavinnu býtast á høvuðsendamál við ferð hjá útgangandi ferðafólkum. Tað vil t.d. siga, hvussu nógvan pening føroysk ferðafólk brúka upp á gisting í sambandi við vinnuferðir í Noregi ella hvussu nógvan pening føroysk ferðafólk brúka uppá bilaleigu í sambandi við frítíðarferðir til Spania.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa tær ymisku vørurnar.

Í teigunum úteftir á talvuni verða tey vitjandi býtt upp í tríggjar bólkar:

- Ferðafólk (vitjandi, sum gista)
- Eindagsvitjandi
- Vitjandi tilsamans (ferðafólk + eindagsvitjandi)

Talva 3 - Nýtsla í útgangandi ferðavinnu

býtt á vørur og sløg av vitjandi

Vørur	Nýtsla í útgangandi ferðavinnu		
	Ferðafólk (vitjandi, sum gista) (3.1)	Eindagsvitjandi (3.2)	Vitjandi tilsamans (3.3) = (3.1) + (3.2)
Tilsamans			
A. Nýtsluvørur			
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur			
1. Gistingartænastur til vitjandi		X	
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfatað av 1.b		X	
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum		X	
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur			
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt			
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi			
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning			
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning			
7. Tænastur innan útleigan av akførum			
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur			
9. Mentanarligar tænastur			
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð			
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið			
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið			
A.2. Aðrar nýtsluvørur			
B.1. Virðislutir			

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

5.5 TALVA 4 – NÝTSLA Í INNANHÝSIS FERÐAVINNU

Í talvu 4 verður nýtslan í inngangandi ferðavinnu (talva 1) og nýtslan í innlendis ferðavinnu (talva 2) løgd saman. Hetta tilsamans verður nevnt nýtsla í innanhýsis ferðavinnu.

Afturat hesum kemur onnur nýtsla í ferðavinnu. Hetta eru ymiskar tænastur, sum ikki verða beinleiðis uppgjørdar, men sum skulu telja sum nýtsla. Dømi um hetta eru útreiðslur til søvn og heilsutænastur, ið ikki verða goldnar av brúkaragjøldum, men sum almenni geirin ber kostnaðin av.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa tær ymisku vørurnar.

Í teigunum úteftir á talvuni verður nýtslan býtt upp í:

- Nýtslu í inngangandi ferðavinnu (talva 1)
- Nýtslu í innlendis ferðavinnu (talva 2)
- Nýtslu í innanhýsis ferðavinnu (talva 1 + 2)
- Aðra nýtslu í ferðavinnu
- Nýtslu í innanhýsis ferðavinnu tilsamans (talva 1 + talva 2 + onnur nýtsla í ferðavinnuni)

Talva 4 - Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu

býtt á vørur

Vørur	Nýtsla í innhýsis ferðavinnu			Onnur nýtsla í ferðavinnu (4.2)	Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu tilsamans (4.3) = (4.1) + (4.2)
	Nýtsla í inngangandi ferðavinnu (1.3)	Nýtsla í innlendis ferðavinnu (2.9)	Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu (4.1) = (1.3) + (2.9)		
Tilsamans					
A. Nýtsluvørur					
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur					
1. Gistingartænastur til vitjandi					
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b					
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum					
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur					
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt					
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi					
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning					
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning					
7. Tænastur innan útleigan av akførum					
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur					
9. Mentanarligar tænastur					
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð					
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið					
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið					
A.2. Aðrar nýtsluvørur					
B.1. Virðislutir					

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

5.6 TALVA 5 – FRAMLEIÐSLUVIRÐIÐ Á FERÐAVINNUVØRUM OG -TÆNASTUM

Talva 5 lýsir samlaða virðið á vørum og tænastum, sum hvør einstøk vinnugrein innan ferðavinnu framleiðir. Dømi um hetta er samlaða virðið á framleiddum vørum og tænastum innan veiting av mati og drykkjuvørum í Føroyum.

Talvan vísir vørur og tænastur, ið verða framleiddar til nýtslu av ferðafólkum. Harumframt vísir talvan eisini aðra framleiðslu av vørum og tænastum, sum ikki verða framleiddar til ferðavinnunýtslu.

Talvan brúkar hugtøkini í framleiðslukontuni í tjóðarroknskapinum. Uppgerðin tekur støði í framleiðslukontu í tjóðarroknskapinum, men hevur neyvari útgreining av vørum og tænastum til ferðavinnunýtslu. Eisini er býtið á vinnugreinar meiri útgreinað innan ferðavinnu.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa tær vørur og tænastur, ið verða framleiddar til nýtslu av ferðafólkum. Røðirnar vísa harumframt vørur og tænastur, sum verða framleiddar til aðra nýtslu enn ferðavinnunýtslu.

Umframt framleiðsluvirði vísir talvan eisini tilfarsnýtslu, bruttovirðisøking, lønir og atknýtt gjøld, restinntøku og aðrar framleiðsluskattir fyri hvørja vinnugrein.

Teigarnir úteftir í talvuni vísa vinnugreinar innan ferðavinnu og síðan aðrar vinnur fyri seg.

Talva 5 - Framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum

Framleiðslukonta fyri ferðavinnu og aðrar vinnur undir einum (í støðisprísum)

Vørur	Vinnugreinar innan ferðavinnu						
	1. Gistingartænastur til vitjandi (5.1)	1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðarar av 1.b (5.1a)	1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum (5.1b)	2. Vinnugreinar innan tænastuveiting av mat- og drykkjuvørum (5.2)	3. Ferðafólkaflutningur á jarnbreyt (5.3)	4. Ferðafólkaflutningur á vegi (5.4)	5. Sjóvegis ferðafólkaflutningur (5.5)
Tilsamans							
A. Nýtsluvørur							
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur							
1. Gistingartænastur til vitjandi							
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b							
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum							
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur							
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt							
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi							
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning							
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning							
7. Tænastur innan útleigan av akførum							
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur							
9. Mentanarligar tænastur							
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð							
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið							
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið							
A.2. Aðrar nýtsluvørur							
B. Ikki-nýtsluvørur							
B.1. Virðislutir							
B.2. Aðrar ikki-nýtsluvørur							
I. Framleiðsluvirði tilsamans (í støðisprísum)							
II. Tilfarsnýtsla tilsamans (í marknaðarprísum)							
(I – II). Bruttovirðisøking tilsamans (í støðisprísum)							
Lønir og atknýtt gjøld							
Aðrir framleiðsluskattir (netto)							
Brutto blandað inntøka							
Bruttorakstraravlop							

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

Vinnugreinar innan ferðavinnu									
6. Loftvegis ferðafólkaflutningur (5.6)	7. Útleigan av akførum (5.7)	8. Vinnugreinar innan ferðaskrivstovuvirksemi og aðrar bíleggingartænastur (5.8)	9. Mentanarligar vinnugreinar	10. Vinnugreinar innan ítrótt og frítíð (5.10)	11. Smásøla av sermerktum ferðavinnuvørum, sum eru serstakar fyri landið (5.11)	12. Vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið (5.12)	Tilsamans (5.13)	Aðrar vinnugreinar (5.14)	Framleiðsluvirði hjá innlendskum framleiðarum (í støðisprísum) (5.15) = (5.13) + (5.14)

5.7 TALVA 6 – FERÐAVINNAN Í BÚSKAPINUM

Talva 6 lýsir búskaparligu virðisøkingina í ferðavinnuni og hvussu stór henda virðisøkingin er í mun til samlaða búskapin. Talvan lýsir sostatt, hvussu stóran part ferðavinnan fyllir í føroyska búskapinum. Talva 6 verður tí mett at vera høvuðstalvan í Tourism Satellite Account.

Talvan vísir, hvussu stórur partur av framleiðsluni av ávísum vørum ella tænastum fer til nýtslu hjá ferðafólkum ella íløgur til ferðavinnuendamál. Hetta verður nevnt ferðavinnulutur (á enskum *tourism share)* av framleiðsluni.

Talvan brúkar hugtøkini í framleiðslukontuni í tjóðarroknskapinum. Hesi hugtøk eru framleiðsluvirði, tilfarsnýtsla, bruttovirðisøking, lønir og atknýtt gjøld, restinntøka og aðrir framleiðsluskattir fyri hvørja vinnugrein.

Talvan er at líkna við samlaða uppgerð av framleiðslukontu í tjóðarroknskapinum, tó við tí undantaki, at framleiðslan hjá veitarum av vørum og tænastum innan ferðavinnu í Føroyum er eyðmerkt. Talvan vísir tí, hvussu stórur partur av hesari framleiðslu fer til nýtslu og íløgur í ferðavinnu.

INNIHALD Í TALVU

Framleiðslan, sum verður víst í talvuni, er býtt á vinnugreinar og vørur.

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni eru tær somu sum í talvu 5. Talvan vísir vørur og tænastur, ið verða framleiddar til nýtslu av ferðafólkum. Talvan vísir eisini aðrar vørur og tænastur, sum verða framleiddar til onnur enn ferðafólk.

Teigarnir úteftir í talvuni vísa vinnugreinar innan ferðavinnu og aðrar vinnur undir einum, umframt innflutning, vøruskattir netto og handils- og flutningsavansur.

Teigarnir geva harvið tilsamans samlaða framleiðsluvirðið í marknaðarprísum. Ferðavinnulutfallið (á enskum *tourism ratio*) fæst við at seta samlaðu nýtsluna hjá bæði innlendskum og inngangandi ferðafólkum í mun til samlaða framleiðsluvirðið.

Talva 6 - Ferðavinnan í búskapinum

Innlendis framleiðsla, innflutningur og innanhýsis ferðavinnunýtsla (í marknaðarprísum)

Vørur	Vinnugreinar innan ferðavinnu							
	1. Gistingartænastur til vitjandi		1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b		1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum		...	
	Framleiðsluvirði (5.1)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.1a)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.1b)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5...)	Ferðavinnulutur (í virði)
Tilsamans								
A. Nýtsluvørur								
A.1. Sermerktar ferðavinnuvørur								
1. Gistingartænastur til vitjandi								
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b								
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum								
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur								
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt								
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi								
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning								
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning								
7. Tænastur innan útleigan av akførum								
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur								
9. Mentanarligar tænastur								
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð								
11. Sermerktar ferðavinnuvørur, sum eru serstakar fyri landið								
12. Sermerktar ferðavinnutænastur, sum eru serstakar fyri landið								
A.2. Aðrar nýtsluvørur								
B. Ikki-nýtsluvørur								
B.1. Virðislutir								
B.2. Aðrar ikki-nýtsluvørur								
I. Framleiðsluvirði tilsamans (í støðisprísum)								
II. Tilfarsnýtsla tilsamans (í marknaðarprísum)								
(I – II). Bruttovirðisøking tilsamans (í støðisprísum)								
Lønir og atknýtt gjøld								
Aðrir framleiðsluskattir (netto)								
Brutto blandað inntøka								
Bruttorakstraravlop								

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

12. Vinnugreinar innan ferðavinnu, sem eru serstakar fyri landið		Tilsamans		Aðrar vinnugreinar (5.14)		Framleiðsluvirði hjá innlendskum framleiðarum (í støðisprísum)		Innflutningur	
Framleiðsluvirði (5.12)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.13)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.14)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (5.15) = (5.13) + (5.14)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (6.1)	Ferðavinnulutur (í virði)

Vøruskattir (netto) á innlendskari framleiðslu og innflutningi		Handils- og flutningsavansur		Innlendsk framleiðsla og innflutningur (í marknaðarprísum)	Nýtsla í innanhýsis ferðavinnu	Ferðavinnulutfall (%)
Framleiðsluvirði (6.2)	Ferðavinnulutur (í virði)	Framleiðsluvirði (6.3)	Ferðavinnulutur (í virði)	(6.4) = (5.15) + (6.1) + (6.2) + (6.3)	(4.3)	(6.5) = ((4.3) / (6.4)) x 100
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			
		X	X			

5.8 TALVA 7 – STARVSSETANIR Í FERÐAVINNUNI

Talva 7 lýsir talið av starvssetanum í ferðavinnuni, samlaða talið av arbeiddum tímum í ferðavinnuni og tal av størvum umroknað til fulla tíð í ferðavinnuni.

Arbeiðsorkan er ikki jøvn gjøgnum alt árið, tí ferðavinnan hevur háárstíðir og lágárstíðir. Viðmælt verður tí at gera mátini upp minst tvær ferðir um árið – í ávikavist háárstíð og lágárstíð.

Teigarnir í talvuni eru býttir upp í kyn og eru harumframt býttir upp í løntakarar og sjálvstøðugt vinnurekandi. Tað ber tí t.d. til at lýsa, hvussu nógvir mannligir løntakarar arbeiða innan sjóvegis ferðafólkaflutning og hvussu nógvar sjálvstøðugt vinnurekandi kvinnur arbeiða við ferðafólkaflutningi á landi.

Talva 7 lýsir eisini, hvussu nógvar fyritøkur eru í hvørjari vinnugrein innan ferðavinnu. Tað ber tí t.d. til at síggja, hvussu nógvar fyritøkur veita tænastu innan útleigan av akførum ella veita tænastu innan mat- og drykkjuvørur, so sum matstovur v.m.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa tær ymisku vinnugreinarnar innan ferðavinnu.

Í fyrsta teigi úteftir á talvuni verður lýst, hvussu nógvar fyritøkur eru í teimum ymisku vinnugreinunum innan ferðavinnu.

Høvuðsyvirskriftirnar í hinum teigunum úteftir í talvuni eru:

- Tal av størvum eftir setanarstøðu
- Tal av arbeiddum tímum eftir setanarstøðu
- Tal av størvum umroknað til fulla tíð eftir setanarstøðu

Undir hesum trimum yvirskriftunum verða løntakarar og sjálvstøðugt vinnurekandi býtt upp í tveir bólkar, sum síðani verða býttir upp í kyn. Harumframt sæst talið av løntakarum og sjálvstøðugt vinnurekandi tilsamans.

Talva 7 - Starvssetanir í vinnugreinum innan ferðavinnu

Vinnugreinar innan ferðavinnu	Tal av fyritøkum	Tal av størvum eftir setanarstøðu					
		Løntakarar			Sjálvstøðugt vinnurekandi		
		Menn	Kvinnur	Tilsamans	Menn	Kvinnur	Tilsamans
Tilsamans							
1. Gistingartænastur til vitjandi							
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b							
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum							
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur							
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt							
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi							
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning							
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning							
7. Tænastur innan útleigan av akførum							
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur							
9. Mentanarligar tænastur							
10. Tænastur innan ítrótt og frítíð							
11. Smásøla av sermerktum ferðavinnuvørum, sum eru serstakar fyri landið							
12. Sermerktar vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið							

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

Tal av arbeiddum tímum eftir setanarstøðu						Tal av størvum umroknað til fulla tíð eftir setanarstøðu					
Løntakarar			Sjálvstøðugt vinnurekandi			Løntakarar			Sjálvstøðugt vinnurekandi		
Menn	Kvinnur	Tilsamans	Menn	Kvinnur	Tilsamans	Menn	Kvinnur	Tilsamans	Menn	Kvinnur	Tilsamans

5.9 TALVA 8 – SAMLAÐA VIRÐIÐ AV ÍLØGUM Í FERÐAVINNUNI

Talva 8 lýsir samlaða virðið av sermerktum íløgum, sum verða gjørdar í ferðavinnuni. Dømi um slíkar íløgur eru gistingarhús, bygningar til matstovur, summarhús við ferðavinnuendamáli umframt bussar, bilar og bátar til ferðafólkaflutning.

Talvan vísir eisini aðrar ognir, sum ikki eru fíggjarligar og sum ikki verða beinleiðis framleiddar til ferðavinnuna, men sum kunnu hava eitt ávíst virði fyri ferðavinnuna. Talan kann t.d. vera um frílendisøki og vøtn.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu í talvuni vísa ymisk sløg av sermerktum íløgum í ferðavinnuni.

Í teigunum úteftir á talvuni verða ferðavinnuíløgurnar býttar á vinnugreinar innan ferðavinnu og til seinast á aðrar vinnugreinar. Uttasti teigurin vísir samlaðu sermerktu føstu bruttoíløgurnar í ferðavinnu. Hetta er ein samanlegging av teigunum frammanundan, sum lýsa sermerktar ferðavinnuíløgur býttar á vinnugreinar innan ferðavinnu og aðrar vinnugreinar.

Talva 8 - Fastar bruttoíløgur í vinnugreinum innan ferðavinnu og øðrum vinnugreinum

Vørur	Vinnugreinar innan ferðavinnu						
	1. Gistingar-tænastur til vitjandi (8.1)	1.a. Gistingar-tænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar av 1.b (8.1a)	1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum (8.1b)	2. Vinnugreinar innan tænastuveiting av mat- og drykkjuvørum (8.2)	3. Ferðafólka-flutningur á jarnbreyt (8.3)	4. Ferðafólka-flutningur á vegi (8.4)	5. Sjóvegis ferðafólka-flutningur (8.5)
Tilsamans							
I. Støðisognir, sum eru sermerktar til ferðavinnu							
1. Gisting til vitjandi							
1.1 Gistingarhús og onnur sløg av gistingarstøðum til vitjandi							
1.2 Frítíðarhús, sum t.d. summarhús, við fullum ognarrætti							
1.3 Frítíðarhús, sum t.d. summarhús, við øðrum sløgum av ognarrætti							
2. Aðrir bygningar uttan bústaðarendamál og bygningar, sum serliga eru til ferðavinnu							
2.1 Matstovur og líknandi bygningar við tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur							
2.2 Bygningar og undirstøðukervi til fjarflutning av ferðafólki							
2.3 Bygningar til mentanarligar tænastur og líknandi, sum verða mest brúktar av vitjandi							
2.4 Høli til ítrótt, frítíð og undirhald							
2.5 Onnur høli og bygningar							
3. Útgerð til ferðafólkaflutning við ferðavinnuendamáli							
3.1 Á landi							
3.2 Sjóvegis							
3.3 Loftvegis							
4. Aðrar maskinur og útgerð, sum er sergjørt til framleiðslu av sermerktum ferðavinnuvørum							
5. Ábøtur av jarðarogn, sum verður nýtt til ferðavinnuendamál							
II. Íløgur hjá ferðavinnu í aðrar framleiddar ognir, sum ikki eru serstakar fyri ferðavinnu							
(I + II). Tilsamans							
Skrivlig viðmerking:							
III. Aðrar ikki-fíggjarligar ognir							

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

Vinnugreinar innan ferðavinnu									
6. Loftvegis ferðafólka-flutningur (8.6)	7. Útleigan av akførum (8.7)	8. Vinnugreinar innan ferðaskrivstovuvirksemi og aðrar bíleggingartænastur (8.8)	9. Mentanarligar vinnugreinar (8.9)	10. Vinnugreinar innan ítrótt og frítíð (8.10)	11. Smásøla av sermerktum ferðavinnuvørum, sum eru serstakar fyri landið (8.11)	12. Vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið (8.12)	13. Tilsamans (8.13)	Aðrar vinnugreinar (8.14)	Fastar bruttoíløgur í ferðavinnu tilsamans (8.15) = (8.13) + (8.14)

5.10 TALVA 9 – ALMENNA FELAGSNÝTSLAN INNAN FERÐAVINNU

Talva 9 lýsir almennu felagsnýtsluna í ferðavinnuni, sum fevnir um almennar tænastur til ferðavinnuna. Dømi um slíkar tænastur er marknaðarføring hjá Visit Faroe Islands og nógvar av tænastunum hjá kunningarstovunum kring landið. Talvan vísir samlaðu útreiðslurnar av almennu ferðavinnutænastunum, sum almennu geirarnir fíggja fyri at fremja ferðavinnu.

Virðið av almennu felagsnýtsluni verður gjørt upp sum samlaðu útreiðslurnar til at framleiða almennu ferðavinnutænasturnar.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa sløgini av almennum tænastum til ferðavinnuna.

Í teigunum úteftir á talvuni verður nýtslan býtt á almennu geirarnar:

- Landið
- Landsøki
- Kommunur

Samlaða nýtslan av tænastunum verður síðan lýst í næsta teigi, har nýtslan hjá almennu geirunum verður løgd saman.

Við hesari talvuni ber eitt nú til at lýsa, hvussu nógvan pening landið brúkar til marknaðarføring av ferðavinnu ella hvussu nógvan pening kommunur brúka til tænastur hjá kunningarstovum.

Talva 9 - Almenn felagsnýtsla innan ferðavinnu

býtt á vørur og almennar geirar

Vørur	Almennir geirar				Skrivlig viðmerking
	Landið (9.1)	Landsøki (9.2)	Kommunur (9.3)	Almenn felagsnýtsla við tilknýti til ferðavinnu (9.4) = (9.1) + (9.2) + (9.3)	Tilfarsnýtsla í vinnugreinum innan ferðavinnu
Tilsamans					
85561 Marknaðarføring av ferðavinnu					
85562 Tænastur hjá kunningarstovum					X
91135 Almennar tænastur innan umsiting í sambandi við útbreiðslu og matveiting, hotell og matstovur					
91136 Almennar tænastur innan umsiting í sambandi við ferðavinnumál					X
Partur av:					
83700 Marknaðarkanningum og kanningum av almannahugsan					X
91260 Tænastum hjá løgreglu og brunaverju					X
92919 Øðrum tænastum innan útbúgving og læru					
92920 Tænastum innan stuðul til útbúgving					

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

5.11 TALVA 10 – IKKI-PENINGALIGIR ÁVÍSAR

Talva 10 lýsir ikki-peningaligar ávísar (á enskum *indicators).* Talvan er sostatt ein uppgerð av mátum innan ferðavinnuna, sum ikki eru peningalig.

Talva 10 er býtt upp í undirtalvurnar 10a, 10b, 10c og 10d:

- Talva 10a lýsir tal av ferðum og gistingum
- Talva 10b lýsir komur og gistingar í inngangandi ferðavinnu
- Talva 10c lýsir tal av gistingarstøðum og kapasitet á gistingarstøðum
- Talva 10d lýsir tal av arbeiðsstøðum í vinnugreinum innan ferðavinnu

Ikki-peningaligu ávísarnir í talvu 10 eru ein týdningarmikil partur av grundarlagnum undir metingunum og tulkingunum av hinum talvunum. Talva 10 hevur tí tilknýti til hinar talvurnar.

Sambært TSA verður viðmælt, at hvørt land mennir fleiri ikki-peningaligar ávísar eftir tørvi.

5.12 TALVA 10A – TAL AV FERÐUM OG GISTINGUM

Talva 10a lýsir tal av ferðum og gistingum. Tølini verða býtt á sløg av ferðavinnu og sløg av vitjandi.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa:

- Tal av ferðum
- Tal av gistingum

Í teigunum úteftir á talvuni verður uppgerðin býtt upp í:

- Inngangandi ferðavinnu
- Innlendis ferðavinnu
- Útgangandi ferðavinnu

Vitjandi verða harumframt býtt upp í tríggjar bólkar:

- Ferðafólk (vitjandi, sum gista)
- Eindagsvitjandi
- Vitjandi tilsamans (ferðafólk + eindagsvitjandi)

Talva 10a - Tal av ferðum og gistingum

býtt á sløg av ferðavinnu og sløg av vitjandi

	Inngangandi ferðavinna			Innlendis ferðavinna			Útgangandi ferðavinna		
	Ferðafólk (vitjandi, sum gista)	Eindagsvitjandi	Vitjandi	Ferðafólk (vitjandi, sum gista)	Eindagsvitjandi	Vitjandi	Ferðafólk (vitjandi, sum gista)	Eindagsvitjandi	Vitjandi
Tal av ferðum									
Tal av gistingum		X			X			X	

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

5.13 TALVA 10B – INNGANGANDI FERÐAVINNA: KOMUR OG GISTINGAR

Talva 10b lýsir komur og gistingar í inngangandi ferðavinnu. Tal av komum og gistingum verður býtt á ferðahættir.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa ymiskar ferðahættir.

Í teigunum úteftir á talvuni verður uppgerðin býtt upp í tal av komum og gistinum.

Talva 10b - Inngangandi ferðavinna: tal av komum og gistingum

býtt á ferðahættir

Vørur	Tal av komum	Tal av gistingum
Tilsamans		
1. Loftvegis		
1.1 Ætlaðar flogferðir		
1.2 Flogferðir, sum ikki eru ætlaðar		
1.3 Privatflogfør		
1.4 Aðrir loftvegis ferðahættir		
2. Sjóvegis		
2.1 Ferðafólkaskip og -ferjur		
2.2 Cruiseskip		
2.3 Stuttleikabátar		
2.4 Aðrir sjóvegis ferðahættir		
3. Á landi		
3.1 Jarnbreyt		
3.2 Ferðafólkabussur ella bussur og annar almennur flutningur á vegi		
(i) Hýruvognar, limusina og privat leiguakfør við bilførara		
(ii) Leiga av manna- ella djórariknum akfari		
3.4 Egið privatakfar (við plássi fyri upp til 8 fólk)		
3.5 Leiguakfør uttan bílagdan førara (upp til 8 fólk)		
3.6 Aðrir ferðahættir á landi (á rossabaki, súkklu, motorsúkklu osfr.)		
3.7 Til gongu		

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

5.14 TALVA 10C – TAL AV GISTINGARSTØÐUM OG KAPASITETUR

Talva 10c lýsir tal av gistingarstøðum og kapasitet á gistingarstøðum. Hetta verður býtt á sløg av gisting.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu á talvuni vísa:

- Tal av gistingarstøðum
- Kapasitet (kømur)
- Kapasitet (sengur)
- Nýtslustig (kømur)
- Nýtslustig (sengur)

Teigarnir úteftir á talvuni vísa vinnugreinar innan gisting.

Talva 10c - Tal av gistingarstøðum og kapasitetur

býtt á sløg av gisting

	Gisting til vitjandi í ISIC 55			Søla, útleiga og umsiting av fastognum í ISIC 68		
	Stuttíðar gistingarvirksemi	Tjaldstaðir, øki til húsbilar og húsvagnapláss	Onnur sløg av gisting	Útleiga og rakstur av egnum ella langleigaðum ognum	Fastognarvirksemi fyri samsýning ella sambært sáttmála	. . .
Tal av gistingarstøðum						
Kapasitetur (kømur)						
Kapasitetur (sengur)						
Nýtslustig (kømur)						
Nýtslustig (sengur)						

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

5.15 TALVA 10D – TAL AV ARBEIÐSSTØÐUM Í VINNUGREINUM INNAN FERÐAVINNU

Talva 10d lýsir tal av arbeiðsstøðum í vinnugreinum innan ferðavinnu. Talið verður býtt á miðaltal av størvum.

Talvan lýsir t.d., hvussu nógv størv eru í miðal innan sjóvegis og luftvegis ferðafólkaflutning.

INNIHALD Í TALVU

Røðirnar niðureftir á vinstru síðu vísa vinnugreinar innan ferðavinnu.

Í teigunum úteftir eru tal av størvum við ymiskum talstrekkjum.

Talva 10d - Tal av arbeiðsstøðum í vinnugreinum innan ferðavinnu

býtt á miðaltal av størvum

	1-4	5-9	10-19	20-49	50-99	100-249	250-499	500-999	>1000	Tilsamans
Tilsamans										
Vinnugreinar innan ferðavinnu										
1. Gistingartænastur til vitjandi										
1.a. Gistingartænastur til vitjandi, sum ikki eru umfataðar										
1.b. Gistingartænastur í sambandi við ogn av øllum sløgum av frítíðarhúsum, sum t.d. summarhúsum										
2. Tænastuveiting innan mat- og drykkjuvørur										
3. Tænastur innan ferðafólkaflutning á jarnbreyt										
4. Tænastur innan ferðafólkaflutning á landi										
5. Tænastur innan sjóvegis ferðafólkaflutning										
6. Tænastur innan loftvegis ferðafólkaflutning										
7. Tænastur innan útleigan av akførum										
8. Ferðaskrivstovur og aðrar bíleggingartænastur										
9. Vinnugreinar innan mentan										
10. Vinnugreinar innan ítrótt og frítíð										
11. Smásøla av sermerktum ferðavinnuvørum, sum eru serstakar fyri landið										
12. Vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru serstakar fyri landið										

Kelda: Hagstova Føroya og TSA:RMF 2008

6 DØMI UM ÚRSLIT

Við støði í nevndu talvum eru nøkur hugsað dømi framleidd fyri at vísa á møguleikarnar við hagtølunum, sum verða framleidd í sambandi við Tourism Satellite Account. Tey dømini verða lýst niðanfyri.

6.1 DØMI 1: INNGANGANDI NÝTSLA OG INNLENDIS NÝTSLA

Ferðavinnuhagtølini, sum Hagstova Føroya framleiðir í sambandi við búskaparískoytiskanningina á hvørjum ári, lýsa inngangandi ferðavinnu.

Um hugt verður eftir innanhýsis nýtslu tilsamans í Danmark, sær býtið í 2019 soleiðis út: 43% av nýtsluni er frá inngangandi ferðavinnu, ímeðan 57% eru frá innlendis ferðavinnu. Innlendis ferðavinna fyllir í miðal 65% av innanhýsis ferðavinnuni í londum í Evropa, ímeðan inngangandi ferðavinna fyllir í miðal 35%.

Um eitt býti á 35% í inngangandi ferðavinnu og 65% í innlendis ferðavinnu verður umsett til føroysk hagtøl, har vit ikki kenna nýtsluna í innlendis ferðavinnu, hevði grafurin sæð soleiðis út:



6.2 DØMI 2: DAGSNÝTSLA EFTIR VØRU OG BÚSTAÐARLANDI

Tað er áhugavert at kanna, hvussu nógvan pening ferðafólk frá ávísum londum brúka og hvat tey brúka peningin til. Eitt dømi um, hvussu nógv eitt týskt ferðafólk brúkar í Føroyum, kundi sæð soleiðis út, har nýtslan er býtt upp í ymiskar vørur og tænastur:



6.3 DØMI 3: DAGSNÝTSLA HJÁ INNGANGANDI FERÐAFÓLKUM EFTIR HØVUÐSENDAMÁLI

Ferðafólk verða flokkað eftir høvuðsendamál við ferðini – í hesum førinum vinnuferðafólk og frítíðarferðafólk. Vinnuferðavinna er eitt øki, sum hevur fingið høga raðfesting innan ferðavinnu í Føroyum. Sambært útlendskum hagtølum hevur hesin bólkurin av ferðafólki eina nógv hægri dagsnýtslu enn frítíðarferðafólk og hetta samsvarar eisini við royndirnar hjá ferðavinnuni í Føroyum. Tó eru hagtøl ikki framleidd um júst hetta. Eitt dømi um nýtslu hjá ávikavist vinnuferðafólkum og frítíðarferðafólkum kundi sæð soleiðis út:



6.4 DØMI 4: HØVUÐSENDAMÁL VIÐ FERÐ

Tað er eisini áhugavert at kanna, hvussu nógv vinnuferðafólk eru í mun til frítíðarferðafólk – ikki minst, tá ið ferðavinnan hevur eitt ynski um at økja talið av vinnuferðafólkum.

Tá ið ferðavinnuhagtøl verða framleidd í sambandi við arbeiðið við Tourism Satellite Account í fleiri ár á rað, ber til at samanbera úrslitini ár fyri ár. Eitt dømi um gongdina frá 2012 til 2021 kundi sæð soleiðis út:



6.5 DØMI 5: NÝTSLA PER ÍBÚGVA

Eitt av endamálunum við Tourism Satellite Account er at kunna framleiða altjóða sambærlig hagtøl. Tá ið Føroyar hava framleitt eina TSA, fer sostatt at bera til at samanbera føroysku ferðavinnuna við ferðavinnuna í øðrum londum á nógvum ymiskum økjum.

Dømið niðanfyri vísir nýtsluna per íbúgva í inngangandi og innlendis ferðavinnu í ymiskum londum.



7 KELDUR

Í hesum parti verða keldur, sum skulu brúkast sum grundarlag undir talvunum í Tourism Satellite Account, lýstar. Talan er um keldur, sum longu verða brúktar til verandi ferðavinnuhagtøl. Harumframt verða ótroyttar keldur á Hagstovu Føroya og nýggjar keldur, sum skulu mennast, lýstar.

Tá ið arbeitt verður við ymiskum keldum, er týdningarmikið at hava í huga, at tað skulu fleiri keldur til at framleiða einstøku talvurnar í TSA.

7.1 NÚVERANDI KELDUR

Hagstova Føroya hevur tvær høvuðsskipanir, sum verða brúkar sum grundarlag undir verandi ferðavinnuhagtølum. Mett verður, at hesar skipanir kunnu tillagast til at virka sum grundarlag undir talvunum í TSA. Skipanirnar verða lýstar í stuttum niðanfyri.

GISTINGARSKIPANIN

Menningin av gistingarskipanini byrjaði í 2011 og skipanin varð síðan sett í verk í 2013. Gistingarskipanin savnar inn upplýsingar frá gistingarstøðum um persónsgistingarnætur, kapasitet á gistingarhúsum og nýtslustig av kømrum og sengrum. Gistingarskipanin er grundarlagið undir gistingarhagtølunum, sum verða útgivin mánaðarliga. Gistingarnætur verða flokkaðar eftir bústaðarlandi og slagi av gisting. Harumframt verða tey gistandi býtt upp í frítíðarferðafólk og vinnuferðafólk umframt bólkar og einstaklingar.

Gistingarskipanin kann tí brúkast sum partur av grundarlagnum undir talvu 10, sum lýsir ikki-peningaligar ávísar.

SPURNAKANNINGIN TIL FØROYSKAR FERÐAVINNUVEITARAR

Einaferð um árið verða føroyskir ferðavinnuveitarar spurdir um umsetning, framleiðslukostnaðir og ársverk í fyritøkuni. Umsetningurin er býttur á vørubólkar. Ferðavinnuveitararnir skulu eisini meta um, hvussu stórur partur av umsetninginum stavar frá inngangandi ferðavinnu. Hendan spurnakanningin er grundarlagið undir metingunum av búskaparískoytinum frá inngangandi ferðavinnuni. Á hvørjum ári verður úrslitið av spurnakanningini givið út í frágreiðing til Visit Faroe Islands.

Spurnakanningin kann í verandi líki brúkast til lýsa ein part av talvu 1 (nýtsla í inngangandi ferðavinnu), talvu 4 (nýtsla í innanhýsis ferðavinnu) og talvu 7 (starvssetanir í ferðavinnuni). Tó verður mett neyðugt at tillaga spurnakanningina til arbeiðið við TSA.

ÁRLIG UPPGERÐ AV FERÐANDI, SUM FERÐAST SJÓVEGIS

Hagstovan fær í løtuni eina árliga uppgerð frá Smyril Line yvir ferðandi, sum ferðast sjóvegis við Smyril Line. Hesir upplýsingar kunnu stuðla undir talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

ÁRLIG UPPGERÐ AV FERÐANDI Á FLOGVØLLINUM BÝTT Á TJÓÐSKAP

Hagstovan fær í løtuni eina árliga uppgerð frá Vága floghavn við upplýsingum um komur og tal av ferðandi. Hesir upplýsingar kunnu stuðla undir talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

7.2 ÓTROYTTAR KELDUR

Á Hagstovu Føroya eru keldur, sum í løtuni ikki verða brúktar til at framleiða ferðavinnuhagtøl. Her verður lýst, hvørjar keldur, sum Hagstova Føroya hevur ræði á, sum kunnu stuðla undir ávísar talvur í Tourism Satellite Account.

HAGTALSSKIPANIN FYRI ALMENNA GEIRAN

Hagtalsskipanin fyri almenna geiran, sum stavar frá upplýsingum úr Búskaparskipan landsins hjá Gjaldstovuni, hevur m.a. upplýsingar um útreiðslur hjá tí almenna. Mett verður, at hendan skipanin við ávísari menning kann veita neyðugar upplýsingar til talvu 9, sum lýsir almennu felagsnýtsluna í ferðavinnuni. Harumframt kann skipanin veita ein part av upplýsingunum til talvu 8, sum lýsir samlaða virðið av íløgum í ferðavinnuni.

ROKNSKAPARSKIPANIN

Roknskaparskipanin, sum stavar frá upplýsingum frá skattaroknskapum frá TAKS, inniheldur m.a. upplýsingar, sum eru grundarlag undir uppgerð av tilfarsnýtslu og framleiðsluvirði hjá føroyskum fyritøkum. Hendan keldan kann brúkast til framleiðslu av høvuðstølum í talvu 5 (framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum), talvu 6 (ferðavinnan í búskapinum), talvu 8 (samlaða virðið av íløgum í ferðavinnuni) og talvu 9 (almenna felagsnýtslan innan ferðavinnu). Ein fullfíggjað uppgerð av talvunum inniheldur eina lýsing av vørubýtinum og til hendan partin krevst ein menning av nýggjum keldum.

LØN OG ARBEIÐSTÍÐ

Skipanin Løn og arbeiðstíð inniheldur m.a. upplýsingar um arbeiðstíð, ársverk og starvsheiti hjá føroyskum løntakarum. Hagstova Føroya fær upplýsingar frá einum stórum parti av føroyskum arbeiðsgevarum. Hesir upplýsingar kunnu brúkast í talvu 7 og 10d um størv í ferðavinnuni.

7.3 NÝGGJAR HØVUÐSKELDUR

Verandi og ótroyttar keldur røkka bert til ein part av grundarlagnum undir teimum 10 talvunum. Neyðugt er tí at menna nýggjar keldur til Tourism Satellite Account.

GJALDSKORTSDÁTUR

Íslendska hagstovan vísir á, at høvuðskeldan undir fleiri av talvunum í teirra TSA, eru upplýsingar um gjaldskortsnýtslu. Mett verður, at ein slík kelda er neyðug fyri at kunna framleiða fleiri av talvunum í TSA. Gjaldskortsnýtsla verður mett at vera millum mest neyðugu keldur í øllum Norðurlondum fyri at gera dygdargóð ferðavinnuhagtøl.

Við upplýsingum um gjaldskortsnýtslu er møguligt at lýsa nýtslu í inngangandi ferðavinnu (talva 1), innlendis ferðavinnu (talva 2), útgangandi ferðavinnu (talva 3) og nýtslu í innanhýsis ferðavinnu (talva 4). Eisini stuðla upplýsingar um gjaldskortsnýtslu undir talvu 5 (framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum) og talvu 6 (ferðavinnan í búskapinum).

Nýtslan verður býtt á vinnugreinar.

Hagstova Føroya hevur havt innleiðandi fund við Felagið peningastovnar um møguleikarnar fyri at fáa atgongd til hesa keldu.

SPURNAKANNING TIL FERÐAFÓLK

Danski granskingarstovnurin Center for regional- og turismeforskning (stytt *CRT*) stendur fyri framleiðsluni av TSA í Danmark í samstarvi við VisitDenmark. Ein av høvuðskeldunum til framleiðsluna av TSA í Danmark er ein umfatandi spurnakanning til ferðafólk, sum VisitDenmark stendur fyri. Spurt verður m.a. um teirra nýtslu, herundir vøru- og tænastukeyp. Mett verður, at ein tílík spurnakanning kann veita týdningarmiklar upplýsingar um bakgrund, atburð og nýtslu hjá ferðafólki, sum ikki kunnu finnast í øðrum keldum.

Ítøkiliga merkir hetta, at nýtslan hjá ferðafólki kann býtast á vørur. Við upplýsingum um gjaldskortsnýtslu kann nýtslan bert býtast út á vinnugreinar. Um tørvur er á fáa nýtsluna býtta á vørur, er ein tílík spurnakanning til ferðafólk neyðug. Mett verður, at spurnakanningin kann gerast í einari minni útgávu enn tann, sum verður gjørd í Danmark. Ein tílík spurnakanning kann fevna um bæði inngangandi og innlendis ferðavinnu og kann brúkast sum grundarlag undir uppgerð av talvu 1 (nýtsla í inngangandi ferðavinnu), talvu 2 (nýtsla í innlendis ferðavinnu), talvu 4 (innanhýsis nýtsla tilsamans), talvu 5 (framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum), talvu 6 (ferðavinnan í búskapinum) og talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

EUROSTAT: AIRBNB, TRIPADVISOR, EXPEDIA OG BOOKING.COM

Tað hevur í fleiri ár verið ein avbjóðing hjá hagstovum og ferðavinnuráðum kring heimin at fáa atgongd til dátur um Airbnb og aðra privata gisting. Í 2021 fingu hagstovurnar, sum eru partur av Eurostat-samstarvinum, atgongd til gistingarupplýsingar frá Airbnb, Tripadvisor, Expedia og booking.com. Hendan keldan skal geva hagstovum betri vitan um privata gisting og hon stuðlar serliga undir allar talvurnar í talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

Føroyar eru ikki limur í ES og heldur ikki partur EBS- og EFTA-samstørvunum og Hagstova Føroya er tí ikki limur í Eurostat, sum er samskipandi hagtalsstovnurin hjá ES. Hagstova Føroya hevur tískil ikki atgongd til hesar upplýsingar. Fyrispurningur er tó sendur til Eurostat umvegis Danmarks statistik fyri at kanna møguleikan fyri at fáa atgongd til hesar dátur um Føroyar.

FARDÁTUR

Í Estlandi verða fardátur (á enskum *mobile positioning data)* nýttar sum partur av grundarlagnum undir ferðavinnuhagtølum. Tá ið ein ferðandi kemur til eitt land, verður simkortið hjá viðkomandi knýtt at farnetinum í landinum. Við hesum upplýsingum ber til at gera upp, hvussu leingi simkortið er í landinum, úr hvørjum landi tann ferðandi kemur og í ávísan mun, hvussu tann ferðandi ferðast í landinum.

Upplýsingar frá hesari kelduni kunnu eisini geva ábendingar um m.a. bústaðarlandið hjá tí ferðandi og longd á ferð. Harafturat kann gerast upp, hvussu nógv útlendsk ferðandi eru í landinum í løtuni. Afturat hesum ber til hjá føroyskum televeitarum at síggja, hvar og hvussu føroysk simkort ferðast uttanlands.

Tað eru lutfalsliga fáar royndir gjørdar í øðrum londum við hesari kelduni. Enn er ivasamt, um vinningurin av hesari kelduni stendur mát við orkuna, sum skal leggjast í at menna kelduna. Viðmælt verður tí í fyrstu syftu at hyggja burtur frá hesari kelduni. Tøkniliga landslagið broytist tó skjótt og tí kann hendan keldan møguliga verða áhugaverd seinni.

8 MENNINGARÆTLAN

Í hesum parti verður greitt frá menningarætlanini fyri talvurnar í Tourism Satellite Account umframt menningarætlanini fyri keldur og skipanir, sum eru neyðugar fyri at menna talvurnar.

8.1 MENNINGARÆTLAN FYRI TALVUR

Í sambandi við forkanningina av Tourism Satellite Account er ein trý ára menningarætlan gjørd fyri tær 10 talvurnar. Grundarlagið undir menningini eru tær keldurnar, sum eru lýstar í undanfarna parti. Sum nevnt í frágreiðingunum um verandi keldur, ber til at fara undir eina partvísa framleiðslu av nøkrum talvum beinanvegin, tí tað er partur av núverandi framleiðslu av ferðavinnuhagtølum.

Myrkablái liturin vísir partvísa framleiðslu, sum kann fara í gongd beinanvegin sum partur av verandi framleiðslu av ferðavinnuhagtølum. Grøni liturin vísir menning av talvu. Ljósablái liturin vísir fulla framleiðslu av talvu.





8.2 MENNINGARÆTLAN FYRI KELDUR OG SKIPANIR

Grundarlagið undir menningini av teimum 10 talvunum er menning av tilhoyrandi keldum og skipanum. Av tí at keldurnar og skipanirnar eru ein so grundleggjandi partur undir talvunum, er ein trý ára menningarætlan gjørd fyri hesar keldur og skipanir. Í hesum parti verður menningin av hesum keldum og skipanum lýst. Harumframt verður víst á, hvørjar talvur skipanirnar og keldurnar serliga fara at stuðla undir.

Myrkablái liturin vísir keldur og skipanir, sum partvíst longu kunnu brúkast til framleiðslu. Grøni liturin vísir menning og tillaging av keldum og skipanum. Ljósablái liturin vísir, nær keldur og skipanir kunnu brúkast til fulla framleiðslu.





GISTINGARSKIPANIN

Gistingarskipanin skal tillagast og víðkast til at kunna veita størri part av grundarlagnum undir talvu 10, sum lýsir ikki-peningaligar ávísar. Í dag verða upplýsingar einans innheintaðar frá gistingarhúsum. Skipanin skal tillagast til at fevna um onnur gistingarsløg, so sum ból og bita, kamping og aðra privata gisting. Harumframt skulu mannagongdir setast í verk, sum skulu tryggja góðskuna av ávísum mátum í sambandi við gisting, sum t.d. uppbýting av høvuðsendamáli við ferð (vinna ella frítíð).

SPURNAKANNINGIN TIL FØROYSKAR FERÐAVINNUVEITARAR

Spurnakanningin til føroyskar ferðavinnuveitarar skal tillagast, soleiðis at flokkingar hóska beinleiðis til talvurnar í TSA. Harafturat skal eitt betri háttalag finnast fyri at áseta populatiónina fyri fyritøkur, sum eru í ferðavinnuni og fyritøkur, sum tengdar at ferðavinnuni.

Ein tillagað spurnakanning til føroyskar ferðavinnuveitarar stuðlar serliga undir talvu 1 (nýtsla í inngangandi ferðavinnu), talvu 2 (nýtsla í innlendis ferðavinnu), talvu 4 (nýtsla í innanhýsis ferðavinnu), talvu 5 (framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum), talvu 6 (ferðavinnan í búskapinum), talvu 7 (størv í ferðavinnuni) og talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

KT-ARKITEKTURUR

Hagstova Føroya hevur fjølbroyttar upplýsingar um virksemið hjá føroyskum fyritøkum í dátugrunnum. Neyðugt er at víðka hesar upplýsingar til eisini at kunna fevna um ferðavinnuupplýsingar. Tað krevur, at KT-arkitektururin hjá Hagstovu Føroya verður víðkaður, so hann eisini kann fevna um hesar upplýsingar.

GJALDSKORTSDÁTUR

Ein avtala skal gerast við NETS og Felagið peningastovnar um at veita upplýsingar um gjaldskortsnýtslu hjá inngangandi, innlendis og útgangandi ferðafólkum. Ein dátutunnil skal gerast frá NETS til Hagstovuna, so at upplýsingar kunnu veitast smidliga og javnan. Ein partur av arbeiðnum er at reinsa dáturnar, tí fleiri av føroysku fyritøkunum, sum eru lýstar í dátunum, eru skrásettar til at vera danskar. Harafturat eru ongi V-tøl í dátunum frá NETS og tí skulu V-tøl knýtast at føroysku fyritøkunum. Hetta er eitt arbeiði, sum áhaldandi skal røkjast.

Gjaldskortsdátur stuðla serliga undir talvu 1 (nýtsla í inngangandi ferðavinnu), talvu 2 (nýtsla í innlendis ferðavinnu), talvu 3 (nýtsla í útgangandi ferðavinnu), talvu 4 (nýtsla í innanhýsis ferðavinnu), talvu 5 (framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum) og talvu 6 (ferðavinnan í búskapinum).

SPURNABLAÐ TIL FERÐAFÓLK

Spurnablaðið, sum skal brúkast til spurnakanningina til ferðafólk, skal mennast. Hetta inniber at áseta teir viðkomandi spurningar, sum skulu lýsa m.a. nýtslu og demografi hjá ferðafólki. Harumframt skulu mannagongdir mennast í sambandi við spurnakanningina.

Úrslitini av spurnakanningini eru serliga við til at stuðla undir talvu 1 (nýtsla í inngangandi ferðavinnu), talvu 4 (nýtsla í innanhýsis ferðavinnu), talvu 5 (framleiðsluvirðið á ferðavinnuvørum og -tænastum) og talvu 6 (ferðavinnan í búskapinum). Til ber at tillaga spurnakanningina, soleiðis at hon eisini fevnir um nýtslu hjá innlendis ferðafólkum (talva 2).

INNSAVNINGARSKIPAN TIL SPURNABLAÐ TIL FERÐAFÓLK

Ein innsavningarskipan skal mennast til at savna inn svar frá spurnakanningini til ferðafólk. Hetta inniber at menna eitt markamót (á enskum *interface*) og sjálva skipanina, sum skal goyma svarini og senda tey til Hagstovu Føroya.

EUROSTAT: AIRBNB, TRIPADVISOR, EXPEDIA OG BOOKING.COM

Ein partur av arbeiðnum verður at reinsa dáturnar, soleiðis at somu gistingarnar ikki verða taldar fleiri ferðir. Dátur frá booking.com kunnu innihalda gistingar frá føroyskum gistingarhúsum, sum t.d. Hotel Brandan, Hilton Garden Inn og Hotel Føroyar, sum longu eru skrásettar umvegis gistingarskipanina. Eisini skulu V-tøl knýtast at gistingarstøðunum.

Hendan keldan fer at stuðla undir talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

MÁNAÐARLIG UPPGERÐ AV FERÐANDI, SUM FERÐAST SJÓVEGIS

Hagstova Føroya fær í løtuni eina árliga uppgerð frá Smyril Line yvir ferðandi, sum ferðast sjóvegis við Smyril Line. Fyri at gera talið av inngangandi ferðafólkum upp títtari er neyðugt, at Smyril Line sendir upplýsingar inn til Hagstovu Føroya mánaðarliga. Til hetta skal ein dátutunnil byggjast frá Smyril Line til Hagstovu Føroya. Harumframt er neyðugt at fáa víðkaðar upplýsingar fyri at vita bústaðarland og fyri at gera tal av inngangandi og útgangandi ferðafólkum upp.

Í løtuni ger Hagstova Føroya ikki tal av ferðafólki og komum upp í sambandi við cruiseskip, sum koma til Føroya. Til hetta krevst, at allar viðkomandi havnir veita Hagstovu Føroya upplýsingar um cruiseskip.

Hendan keldan fer at stuðla undir talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

MÁNAÐARLIG UPPGERÐ AV FERÐANDI Á FLOGVØLLINUM BÝTT Á BÚSTAÐARLAND

Hagstova Føroya fær í løtuni eina árliga uppgerð frá Vága floghavn við upplýsingum um komur og tal av ferðandi býtt á ríkisborgaraskap. Sambært leiðreglum í TSA skulu ferðandi býtast á bústaðarland og ikki ríkisborgaraskap. Fyri at gera talið av inngangandi ferðafólkum upp títtari er neyðugt, at Vága floghavn sendir upplýsingar inn til Hagstovu Føroya mánaðarliga. Til hetta skal ein dátutunnil byggjast frá Vága floghavn til Hagstovu Føroya.

Hendan keldan fer at stuðla undir talvu 10 (ikki-peningaligir ávísar).

9 PERSPEKTIVERING: ØKISBÝTT FERÐAVINNUHAGTØL

Framleiðsla av ferðavinnuhagtølum eftir Tourism Satellite Account-leisti kann tillagast til at framleiða økisbýtt ferðavinnuhagtøl. Hetta verður nevnt *Regional Tourism Satellite Account,* stytt *RTSA.*

Í stuttum merkir hetta, at ferðavinnuhagtøl verða framleidd fyri tey ymisku økini í hvørjum landi, soleiðis at tað ber til at lýsa búskaparliga týdningin av ferðavinnuni í einum ávísum øki. Tá ber t.d. til at lýsa nýtsluna hjá ferðafólkum, sum vitja í Norðoyggjum ella hvussu nógv í Suðuroy arbeiða í ferðavinnuni. Tá ið slík økisbýtt ferðavinnuhagtøl verða framleidd, ber eisini til at samanbera ferðavinnuna í teimum ymisku økjununum í landinum umframt at samanbera øki í Føroyum við líknandi øki í øðrum londum.

RTSA Í NORÐURLONDUM

Fleiri av hinum Norðurlondunum hava arbeitt við at menna Regional Tourism Satellite Account í nógv ár og serliga Danmark er frammaliga á hesum øki. Hagstova Føroya og Visit Faroe Islands eru partur av norðurlendskum samstarvi, sum er í gongd við at menna felags hugtøk og háttalag fyri framleiðslu av RTSA í Norðurlondum. Endamálið við norðurlendska samstarvinum er at menna eina handbók fyri RTSA í Norðurlondum fyri at hava somu uppgerðarhættir tvørtur um landamørk.

MENNING AV RTSA Í FØROYUM

Mett verður, at tað fyrst og fremst er neyðugt at menna eina TSA í Føroyum. Mett verður tó eisini, at tað ber til at arbeiða við norðurlendska RTSA-samstarvinum samstundis, sum føroyskt TSA verður ment. Hetta tí at RTSA byggir á TSA.

Menning av einari føroyskari RTSA fer at krevja nærri kanningar fyri at meta um, hvat skal til fyri at framleiða eina RTSA í Føroyum. Mett verður, at ein minni tørvslýsing skal gerast eftir stigi 1 í GSBPM, sum verður lýst í 2. parti av hesum uppriti. Støddin á tørvslýsingini er treytað av, hvussu stórur partur av TSA skal økisbýtast. Møguleiki er fyri at velja at økisbýta eitt avmarkað tal av teimum 10 talvum.

Í sambandi við eina slíka tørvslýsing skal ein minni forkanning gerast á sama hátt, sum gjørt er fyri TSA. Tað snýr seg um at eyðmerkja tørvin, eftirkanna og staðfesta tørvin, áseta ynskta úrslitið, eyðmerkja neyðugu hugtøkini í hagtalsframleiðsluni, kanna hvørji hagtøl eru tøk til hagtalsframleiðslu og til seinast at fyrireika eina kostnaðarmeting.

Forkanningin skal serliga koma fram til, hvørji háttaløg og keldur skulu mennast fyri at kunna økisbýta TSA. Til dømis kunnu tal av løntakarum og lønarútgjaldið í ferðavinnuni í ymisku økjunum brúkast sum lyklar til at økisbýta talvur í TSA. Og til dømis kann framleiðsluvirðið av vørum og tænastum í ferðavinnuni í talvu 5 gerast upp fyri eitt ávíst øki við at brúka samlaða framleiðsluvirðið í landinum og síðan býta hetta út á øki við støði í eitt nú lønarútgjaldingum og tal av løntakarum í økinum.

Stórur partur av TSA-forkanningini og framhaldandi arbeiðið, sum verður gjørt í sambandi við menningina av einari føroyskari TSA, kann endurnýtast til menningina av einari føroyskari RTSA. Hetta er tí, at RTSA byggir víðari á somu uppgerðarhættir, sum verða brúktir til framleiðslu av TSA.

10 KELDULISTI

Eurostat (2019), ***Tourism Satellite Accounts in Europe*.** Luksemborg: Publications Office of the European Union.

Fonnesbech-Sandberg, Martin & Krag, Jeppe (2021), ***Turismens økonomiske betydning i Danmark 2019*.** Keypmannhavn: VisitDenmark.

Frenţ, Christi (2013), ***The Economic Benefits of Tourism in Iceland: Boosting the Icelandic Tourism Satellite Account Development.*** Akureyri: Icelandic Tourism Research Centre.

Karlsdóttir, Anna & Nora Sánchez Gassen (2021), ***Regional Tourism Satellite Accounts for the Nordic Countries*.** Stockholm: Nordregio.

United Nations Statistics Division, Statistical Office of the European Communities, Organization for Economic Co-operation and Development & World Tourism Organization (2008*), **Tourism Satellite Account: Recommended Methodological Framework 2008***. Madrid: World Tourism Organization.

United Nations Statistics Division & World Tourism Organization (2008), ***2008 International Recommendations for Tourism Statistics***. Madrid: World Tourism Organization.

United Nations Statistics Division (2016), ***International Recommendations for Tourism Statistics 2008 Compilation Guide.*** New York: United Nations.

Zhang, Jie & Hedetoft, Anders (2011), ***Turismesatellitregnskab og turisters forbrugsmønstre i Danmark.*** Keypmannahavn: Jurist- og Økonomforbundets forlag.

HAGSTOVA FØROYA
KVÍGGJARTÚN 1 • POSTRÚM 2068 • FO-165 ARGIR